07 VESTUR — ÍBV

Kappingarárið 2017
12. august kl. 17.00

Leikskrá nr. 8

07 Vestur
Postboks 51
370 Miðvágur

Formaður:
Jim Sonni Guttesen
jims@jims.fo

Næstformaður:
John Weihe
jwveiting@gmail.com

Kassameistari:
Jón Nordendal
jon@lbf.fo

Nevndarlimur:
Egil Petersen

07 Vestur leikskrá
Útgevari: 07 Vestur

Ábyrgd:
Fróði Poulsen

Myndir og greinar.
Jóanis Albert Nielsen
Ingolf S Olsen
Jarnhold Nattestad
Fróði Poulsen

Vælkomin á Dungasand!

At 07 Vestur-fjepparar eru til, og nógvir eisini, fingu vit prógvað inni á Skála sunnudagin.

Í bussi og hópin av bilum, vóru vitjandi áskoðararnir nógv fleiri í tali enn tey heimahoyrandi. Og í gangi vunnu vit væl og virðiliga dystin á áskoðaraplássunum. Væl stuðlað av áhaldandi "dreingjakórinum" og Bigga á trummu.

1-0 sigurin á Skála sunnudagin stendur í minninum sum ein tann mest spennandi fótbóltsupplivingin nakrantíð. Við tíggju monnum í næstan allan seinna hálvleik og bert einum, sera væl spældum, máli, gjørdist spenningurin óúthaldandi. Knøðini skulvu og fleiri ferðir tordu 07 Vestur-fjeppararnir ikki at hyggja, meðan stinna verja okkara ruddaði undan og ruddaði undan, inntil klokkan til endans bleiv 96, og vit kundu jubla sum sjálvdan áður.

Í dag hava vit vitjan úr Sundalagnum, haðani eitt av formliðunum í EFFO-deildini, EB/Streymur, er komið vestur. Seinastu trý umførini, móti HB, Skála og KÍ, hava teir tikið 7 stig, og lagt seg uppá 6. pláss, 7 stig frammanfyri okkum.

Vit vita at hvør dystur er ein finala. Og á heimavølli móti hinum uppflytarunum eru fortreytirnar fyri einum góðum úrsliti. Men skulu vit taka øll trý stigini, sum sjálvsagt er málið, mugu vit endurtaka innsatsin á og uttanfyri vøllin.

Annars skulu vit nýta høvið at takka Albert Ellefsen fyri arbeiði hann hevur lagt í sítt virki sum hjálparvenjari okkara, og ynskja honum blíðan byrð víðari, sum, fyribils, høvuðsvenjari hjá ÍF. Kanska hann kann geva okkum eina hjálpandi hond og taka stig frá Skála í dag.

Koyrið á 07 Vestur!

Jarnhold Nattestad

VANGAMYNDIN

Navn: Asbjørn Heðinsson

Aldur: 16 ár

Hædd: cm 178

Vekt: kg 71

Yndis matur: røst súpan

Títt pláss á vøllinum: haldi ikki man kann siga at eg havi nakað fast

Vinstra ella høgra bein: høgra

Onnur feløg tú hevur leikt við: SÍF

Hvørjum liði heldur tú við, og hvør er tín yndisleikari? Manchester United Høgni Egilstoft Nielsen

Hvør er tann mest skemtiligi á liðnum? Ken

Hvør er pressarin á liðnum? Torstein

Um tú er/var áleypari, hvør skuldi so verið hin áleyparin? Dann

Stórsta uppliving í fótbóltinum? Vinna 17-0 á MB

Stutt frágreiðing um títt fótbóltslív. Byrjaði sum 10 ára gamal hjá SÌF og tá ið eg var 13 byrjaði eg at spæla við 07 Vestur

effo

deildin

2017

Effo ynskir øllum ein góðan dyst

Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

WWW.JANUAR.FO

SENDISTOVAN

Sand- og skervsølan í Sandavági
Alt innan tilfar - veitan og levering
Lastvognskoyring v/Erhard Dam ✆ **213577**

Find us on Facebook
Lastvognskoyring v/ Erhard Dam

Vága Fysioterapi

v/ Klæmint Isaksen Dip.MDT
Hjørleif Niclasen Cert.MDT,MFE

Fyribyrging, diagnosteriserning

Hornavegur 12
370 Miðvágur
Tlf. 332 007

fysioterapi@fysioterapi.fo

BANKNORDIK
Tað er heildin, sum telur
Bílegg fund á
www.banknordik.fo/nordik360
Ráðgeving, sum øll skilja

www.wt.fo

MYNDLIST
Rammusøla og -verkstaður · Móritsarvegur 1 · FO-188 Hoyvík
tel. +298 25 95 05 · www.facebook.fo/myndlist.fo · myndlist@myndlist.fo

Pre-Order

Keyp on-line og slepp undan bíðirøð!

1. Bilegg og gjald á heimasíðuni
2. Heinta vøruna í handlinum
3. Flúgv út í heim

1. Bilegg og gjald á heimasíðuni
2. Flúgv heim til Føroya
3. Heinta vøruna í handlinum

Klárt til avheintan - einki roks

Tú kanst nú fáa bílagt og goldið tínar tollfríu vørur longu áðrenn tú kemur í Vága Floghavn.

Vel tínar vørur millum okkara mongu góðu tilboð í **dutyfree.fo**, koyr vørurnar í innkeypskurvina og avgreið ordran við tínum gjaldskorti.

Tá ið tú kemur í Vága Floghavn, hava vit pakka tær vøruna og kanst tú fara beinleiðis víðari á tínari ferð.

Einfalt, skjótt og einki roks.

Les meira og bílegg tínar vørur á **www.dutyfree.fo**.

P/F Duty Free FAE Vága Floghavn 380 Sørvágur Faroe Islands Tel. 35 44 00

Banki - Trygging - Pensjón - Heim

Alt á sama stað

Betri pensjón, Eik banki, Tryggingarfelagið Føroyar og Inni skifta navn til Betri. Vit hava savnað allar okkara tænastur, soleiðis at tað gerst bæði lættari og betri hjá tær at vera kundi hjá okkum - alt á einum og sama stað.

betri

Heildarloysnir frá Articon

ARTICON

Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo

Sp/f Mykines
Bryggjan 17
FO-380 Sørvágur
Tel. +298 21 08 70
www.mykines.fo

mykines.fo
must see from sea

IDEmøblar

HÚSFRÍÐKAN

EINGJARTOFTIR 9 • SANDAVÁGUR • TEL 33 33 20

BUSSKOYRING

- Til og frá Flogvøllinum
- Útferðir kring alt landið
- Uttanlandsferðir

Tlf. 21 98 99

Grevstur og Planering V/Eggaba Andreasen
Fartlf. 228 382 - Fartlf. 265 340
Grevstur&Planering

Alt stoypiarbeiði
verður gjørt
Erik Heinesen, Bøur
Tel: 593602

Klima
Torkilsvegur 15
360 Sandavágur
+298 333 555
klima@klima.fo
Klima
hevur loysnina til tín, eisini ta grønu

J.H. Schrøters gøta 7
Postsmoga 258
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 660500
t-postur sokn@sokn.fo

SÓKN
ADVOKATAR

.fo
Vágaportalurin

Vágafólk lesa
Vágaportalin

.fo
Vágaportalurin

Vága Fysioterapi

v/ Klæmint Isaksen Dip.MDT
Hjørleif Niclasen Cert.MDT,MFE

Fyribyrging, diagnosteriserning

Hornavegur 12
370 Miðvágur
Tlf. 332 007

fysioterapi@fysioterapi.fo

EB/Streymur kemur á vitjan

18. umfar í EFFO-deildini er á skránni, og vit taka móti teimum blásvørtu úr EB/Streymi, sum hava sandavágsmannin Rógva E. Nielsen sum liðskipara.

Bæði vit og EB/Streymur vunnu seinasta umfar, tá ið teir vunnu móti toppliðnum KÍ og vit vunnu á Skála.

Okkara trý stig móti Skála høvdu ein ótrúligan stóran týdning í botnstríðnum. Vit liggja framvegis á næstaftastaplássinum, og undir niðurflytingarstrikuni. Við sigrinum á Skála eru vit nú bert trý stig undir niðurflytingarstrikuni. Høvdu vit hinvegin tapt dystin so vóru heili 6. Stig upp til næsta lið, sum so hevði verið Suðringar.

EB/Streymur hevur fingið eina flúgvandi byrjan uppá seinnuhálvu, teir hava fingið 7 útav 9 stigum. Teir hava vunni á HB og KÍ, og leik javnt móti Skála. So okkara menn skulu verða klárir frá byrjar um vit ikki ætla okkum eitt tap móti Rógva og hinum í EB/Streymi.

Jóanis Albert Nilsen

VANGAMYNDIN

Navn: Petur Gullstein Dalbø

Aldur: ár 26

Hædd: cm 179

Vekt: kg 70

Yndis matur: Blóðpylsa

Títt plass á vøllinum: miðvallari og høgri bakk

Vinstra ella høgra bein: høgra

Onnur feløg tú hevur leikt við: Víkingi

Hvørjum liði heldur tú við, og hvør er tín yndisleikari?

07 Vestur og Manchester United, Yndisleikari er Cristiano Ronaldo og Gunleif "Xavi" Magnusarson

Hvør er tann mest skemtiligi á liðnum?
Ken Fagerberg

Hvør er pressarin á liðnum?
Torstein Mýlingstind

Um tú er/var áleypari, hvør skuldi so verið hin áleyparin?
Torstein Mýlingstind

Stórsta uppliving í fótbóltinum? Flyta upp við 07 Vestur og vinna steypakappingina við Víkingi

Stutt frágreiðing um títt fótbóltslív.
Ungdómsárini spældi eg við GÍ, síðani við Víkingi og so til 07 Vestur

VisitVágar
part of the Faroe Islands

Flogvøllurin 2 FO-380 Sørvágur
(+298) 33 34 55
vagar@visitvagar.fo

pf. **FOSSÁ**
og HÝSISÁ

Tlf. 332691 - Fartlf. 212526 - Fax 333691
FO-360 Sandavágur

SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum skatti
Afturrindan av mvg
Eftirlønum

sansir.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. · Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn · Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT | løggildir grannskoðarar

Heri Múller **TIMBURMAÐUR**
Junkaravegur 7
340 Kvívík
Tlf. 560560

Betong og timburarbeiði
Jóni Durhuus, byggimeistari • FO-350 Vestmanna • Tlf. 424473 - 223124

LEIKARALISTI

FAROE SOCCER.com

07 VESTUR

Navn	Pláss	Aldur	Dystir	Min.
Torstein Mýlingstind	V	24 ár	17	1497
Høgni Nielsen	V	20 ár	17	1415
Tór-Ingar Akselsen	M-Á	36 ár	17	1225
Martin Tausen	M	27 ár	16	1418
Holgar Durhuus	M	24 ár	16	1370
Sølvi Egilsson	M	22 ár	16	1252
Ken Fagerberg	Á	28 ár	15	1078
Gunleif Magnusarson	M	26 ár	13	1073
Jóannis á Steig	V	20 ár	13	464
Jákup S. Olsen	M	22 ár	12	414
Søren Nielsen	Á	26 ár	11	832
Janus Samuelsen	M	18 ár	11	792
Petur G. Dalbø	V	26 ár	11	575
Ivan Stojkovic	MV	40 ár	10	872
Asbjørn Heðinsson	V-M	16 ár	10	426
Silas Eyðsteinsson	MV	19 ár	8	658
Dann Fróðason	M	17 ár	4	157
Pál Fjelde	V	23 ár	3	270
John Frederiksen	Á	21 ár	3	113
Sigtór Asbjørn Petersen	M	29 ár	2	135
Rói Hansen	Á	20 ár	1	14
Teitur Olsen	M	19 ár	0	0
Niels Mouritsen	V	18 ár	0	0

Venjari:
Trygvi Mortensen
Hjálparvenjari:
Sigtór A. Petersen

VÍKINGUR

Navn	Pláss	Aldur	Dystir	Min.
Rógvi Nielsen	V-M	24 ár	17	1450
Leif Niclasen	V-Á	30 ár	17	1073
Poul G. Olsen	V-M	25 ár	16	1440
Jóhannes Hansen	V-M	21 ár	16	1326
Rói Olsen	V-M	20 ár	16	1170
Trygvi Askham	MV	29 ár	15	1350
Dan í Soylu	M	21 ár	15	1282
Arnar Dam	Á	25 ár	15	916
Árni Olsen	M	23 ár	14	1211
Brian Olsen	M	31 ár	14	1009
Ragnar Danielsen	V	25 ár	14	923
Tóki á Lofti	M	23 ár	13	610
Andras Olsen	V	21 ár	10	900
Petur Zachariasen	V-M	22 ár	10	900
Sjúrður Jacobsen	V	40 ár	9	389
Niklas T. Kruse	M-Á	18 ár	7	198
Arnbjørn Hansen	Á	31 ár	7	118
Pætur Petersen	M-Á	19 ár	3	223
Rói Zachariasen	MV	18 ár	2	180
Ari Olsen	Á	19 ár	2	134
Ári Kruse	V	21 ár	2	19
Jan á Høgaryggi	Á	19 ár	1	11
Tóki Johannesen	M	20 ár	0	0
Høgni Hummeland		20 ár	0	0
Allan Midjord	M	23 ár	0	0
Fríði Johansen		17 ár	0	0
Jákup Andrias Hansen	MV	23 ár	0	0
Símun Jóhan Wolles	MV	20 ár	0	0

Venjari: Anders Gerber

Støðan í Effodeildini

Nr	Lið	D	MM	S
1	Víkingur	17	22	35
2	NSÍ	17	26	33
3	KÍ	17	9	32
4	B36	17	16	29
5	HB	17	6	24
6	EB/Streymur	17	-9	21
7	TB/FCS/Royn	17	-6	20
8	Skála	17	-7	17
9	07 Vestur	17	-25	14
10	ÍF	17	-32	6

unicar.fo
FAIR CAR RENTAL - +298 544 000
BILAR TIL SØLU Á UNICAR.FO

Faroe Travel
- Ferðaseðlar um allan heim
www.travel.fo

Skógvar og klæðir til kvinnur og menn
John Poulsen
FO-385 Vatnsoyrar . Tlf. 332034 . jp@johnpoulsen.fo

CARRO
carro.fo - 21 25 51

TEAM
POLARIS
RZR
4A
www.4a.fo
Bakkavegur 35 • 380 Sørvágur • +298 22 87 41 • 4a@4a.fo

Spf. KJO v. Kristian Olsen
Sørvágur
Tel 210452-210952
Maskin og Lastvognskøring

WENGER
SAMLA
MERKIR
FYRSTA FLOKS TASKUR
OG KUFFERT
Føroya Keypssamtøka
Tín handil
Einans
limir í FK
kunnu gera nýtslu
av merkjunum
Til og við
10. JUNI 2017
fært tú eitt samlimerki,
fyri hvørjar 50 kr, ið tú
keypir fyri í tínum
FK handli.

Nýggjur leikari er bjartskygdur

John Frederiksen trýr 100 prosent upp á, at 07 Vestur fer at halda fast í Effo-deildini. Sum miðvingur uppvaksin í Danmark er hann errin av nú at fáa høvi at spæla fyri júst 07 Vestur.

Ingolf S. Olsen

Hóast uppvaksin í Danmark er blóðið hjá nýggja 07 Vestur-áleyparanum John Frederiksen so lokalt, sum tað fær verið. Bæði foreldrini eru nevniliga úr Miðvági.

Sum framsøkin og málrættaður fótbólsspælari er 21 ára gamli John Frederiksen grammur eftir at røkka langt í fótbóltsheiminum, men hann dylir ikki, at tað nertir við kenslurnar og æruna, at hann nú hevur fingið høvi at berjast fyri lívinum hjá sínum lokala føroyska liði í bestu deildini.

Og hann er eisini sera vónríkur um, at tað fer at eydnast.

- Eftir sigurin á Skála haldi eg, at tað sær gott út, og eg trúgvi 100 prosent upp á, at vit nokk skulu klára tað. Tað krevur sjálvsagt gróthart arbeiði, tí fleiri strævnir dystir eru eftir, men vit hava eisini fleiri dystir eftir ímóti liðunum í niðara endanum, eisini heimadystir, har vit eiga at klára at fáa fulla úrtøku, sigur John.

Familjuorrusta

Tann fyrsti av hesum er dagsins dystur ímóti EB/Streymi, og er John serliga spentur til júst henda dystin, tí her sleppur hann at royna seg ímót systkinabarninum Trygva Askham í EB/Streymamálinum.

- Tað verður spennandi við einum sovorðnum familjudysti; Trygvi er ein sera góður málmáður, men sjálvandi klári eg at skora ímóti honum, og eg vænti eisini avgjørt, at vit fáa trý stig, sigur John eitt sindur argandi, men sjálvsálitið, sum lýsir av honum, vísir, at hann sanniliga meinar tað.

At hann nú er vorðin ein av fremstu máltevjarunum hjá 07 Vestur er eitt sindur av tilvild. Í veruleikanum var hann bara komin heim til Føroya at halda summarfrí, tá boð vóru eftir honum tíðliga í juli.

- Jákup í Stórstovu er umboðsmaður hjá mær og hevur hjálpt mær nógv. Tá hann frætti, at eg var í Føroyum, syrgdi hann fyri, at eg slapp til royndarvenjing við 07 Vestur. Hetta var 10. juli, og longu sama kvøld hevði eg skrivað undir sáttmála fyri restina av kappingarárinum, greiðir John frá.

Stutt eftir spældi hann sín fyrsta dyst fyri 07 Vestur, ein venjingardyst ímóti HB, sum 07 Vestur tapti 2-4, men John skoraði tað eina málið og fekk sostatt beinanvegin víst sítt virði sum framherji.

Týdningarmikil sigur

Fyrstu landskappingardystirnir hjá honum í Effo-deildini vóru tó lítið hugaligir – fyrst eitt 0-7 tap á heimavølli ímóti NSÍ 22. juli, og á ólavsøku eitt 2-0 tap úti ímóti B 36.

Men seinasta vikuskifti bragdaði, tá trý sera, sera týdningarmikil stig vórðu vunnin úti ímóti Skála, sum er næsti kappingarneytin omanfyri niðurflytingarstrikuna. 07 Vestur legði seg á odda í fyrra hálvleiki við máli, sum Ken Fagerberg skoraði. Men seinastu 35 minuttirnar av dystinum vóru ein rein marra fyri 07 Vestur, tí Sølvi Egilsson varð vístur av vølli, tá seinna gula kortið hjá honum var vekslað um til reytt kort.

- Sigurin á Skála var avgerandi. Vit vórðu undir ógvuliga hørðum trýsti, tá vit vóru ein maður minni. Øll orkan varð løgd í tað defensiva arbeiðið, og vit vardu sigurin heim. So vit fingu víst, at verjuparturin hjá okkum virkar, og tað er gott.

- Tað er sjálvandi ein smeitur, at Sølvi Egilsson nú hevur leikbann, men eg haldi, at vit hava ein somikið breiðan hóp og

eru so væl fyri mentalt, at tað ikki fer at bila ímóti EB/Streymi, sigur John Frederiksen.

Vit vilja Effo-deildina

John heldur, at úrslitið á Skála, tó at tað var tepurt, eisini ber boð um, at liðið er við at fóta sær.

- Vit fóru at fokusera meira upp á tað mentala eftir skrædlið ímóti NSÍ. Tá ein fær eitt so stórt tap upp á ein sovorðnan máta, sum vit gjørdu í tí dystinum, so gerast nógv viðurskifti greið fyri alt liðið. Vit vóru noyddir at hyggja í eyguni hvør á øðrum og finna út av, hvar og hvussu vit skulu betra okkum.

- Mentalt var tað týdningarmikið at seta okkum spurningin, um vit vilja hetta ella ikki. Allir vóru kanska ikki púra klárir mentalt, og tað haltaði við tí taktiska. Men vit vórðu samdir um, at tað er hetta, vit vilja – vit vilja spæla í Effo-deildini – og vit vilja arbeiða gróthart fyri hvønn annan, so tað skal eydnast at verða verandi í deildini.

- Har er enn ymiskt taktiskt, vit skulu fáa upp á pláss, og viðvíkjandi mátanum vit arbeiða saman, men eg haldi, at tað samanumtikið sær skilagott út. Fokus er nú á samanhaldið og at arbeiða hart fyri hvønn annan, sigur John.

Á føroyskum U-landsliðum

Áðrenn John Frederiksen kom til 07 Vestur hevur hann spælt hálvt annað kappingarár við danska Fredensborg, sum hann var við til at lyfta upp úr Danmarksserien í 2.deild. Hann hevur eisini sun yngri leikari verið partur av keypmannahavnska stórfelagnum FCK, men fótbóltsuppvøksturin hevur verið í Neksø á Bornolm, har hann eisini er uppvaksin.

Í føroyskum fótbóltshøpi er John Frederiksen als ikki ókendur heldur, tó at hann er nýggjur í landskappingarfótbólti. Hann hevur áður gjørt um seg á bæði á føroyska U17- og U19-landsliðnum.

Trygt bakland

Nú hann er komin at spæla við 07 Vestur, býr hann í tryggum umhvørvi hjá ommuni og abbanum í Miðvági, har systirin er nærmasti granni.

- Eg kenni eisini nakrar av liðfeløgunum frammanundan, sum eg havi verið saman við frá barni av, tá eg havi vitjað í Føroyum. So eg kenni meg bæði væl og heima her, sigur John.

Ongin livir av at spæla fótbólt í Føroyum, heldur ikki John Frederiksen, sum hevur fingið fulltíðarstarv í Sandavágs Timburhandli, ein av sponsorunum hjá 07 Vestur. Hann hevur annars útbúgving sum námsfrøðiligt hjálparfólk, og í Danmark arbeiddi hann við ungum, sum vóru í vanda fyri at enda úti í kriminaliteti.

Í Sandavágs Timburhandli er annars um reppið, at teir fáa mannað eitt gott innandura lið, tí afturat John starvast ikki færri enn tríggir 07 Vestur-leikarar har: Høgni Egilstoft Nielsen, Gunleif Magnusarson og Jákup Sveinbjørn Olsen.

John Frederiksen er sannførdur um, at 07 Vestur fer at halda fast í Effo-deildini, og hann væntar eisini trý stig í dagsins dysti.

Sandavágs Timburhandil er ikki bara sponsor hjá 07 Vestur, fyritøkan er eisini eitt satt 07 Vestur-arbeiðsplass. Ikki færri enn fýra lyklaleikarar starvast í timburhandlinum. Úr vinstru eru tað Jákup Sveinbjørn Olsen, Høgni Egilstoft Nielsen, Gunleif Magnusarson og John Frederiksen.

Hølcksmíð

v/Gerhard Hansen

Alt innan timburar-beiði

Tlf. 282710

Neinbjørn Nattestad
Bilverkstaður
Tlf. 332727 | Fax. 333727

MÚRARIN

V/ Kell E. Jensen
Kálvalíðvegur 10
370 Miðvág
tlf. 332779 og 222101
t-post: murarin@olivant.fo

Sportigan

ÍTRÓTTUR. ALT ÁRIÐ.

KEYP EISINI OKKARA VØRUR
Á FØROYA FEITASTA NETHANDLI

WWW.SKALKUR.FO

ÓKEYPIS TIL DYRNAR
Í ØLLUM FØROYUM.

| SMS 31 95 12 | SALTANGARÁ 45 95 12 |

VIÐLÌKAHALDSFRÌTT

PLASTKLÆDNING OG BJÀLVING

Vit umboða dygdar húsaklæðningin úr plast.
Týski klæðningurin er sera væl egnaður til føroyska veðurlagið.

10 ymiskir litir eru at velja í,
og horn og listar fáast í somu litum.

Brettini eru heill 6 metur til longdar.

SANDAVÁGS TIMBURHANDIL

Hillingatangi - 360 Sandavágur - Tlf. 332700 - www.timbur.fo

Vit knýta Føroyar nærri at umheiminum

við 2.900 fráferðum og komum árliga - beinleiðis til 12 ymisk ferðamál



- **Okkara flogfør eru serútgjørd til at flúgva upp á Føroyar**
- **Á føroyskum veingjum í útvið 30 ár**
  Til gaman og álvara, sól og summar, vinnu og mentan
- **Serføroysk tænasta**
- **Kappingarførir prísir**

1XFETUR

#FLÚGVAFYRIFØROYAR

Atlantic Airways Vagar Airport 380 Sørvágur Tel 34 10 00 www.atlantic.fo

ATLANTIC AIRWAYS

BURÐARDYGGUR
HAVBÚNAÐUR

HIDDENFJORD®

Raised in the Wild.



www.hiddenfjord.com • hiddenfjord@hiddenfjord.com • +298 662100